

TOYOTA AVENSIS 2,0 TD SEDAN TERRA — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: DR 131 KM: 131.000
Árgangur: 22.07.98 Seinast sýnaður: 04.03.05
Viðmerkingar: Fjarstýrt sentrallás · Radio/CD · Elrútar framman
Útgjald kr. 35.410,- Kr. 98.000,-



TOYOTA COROLLA 1,3 XLI H/B

Skrásetingarnr.: HB 469 KM: 156.000
Árgangur: 25.03.97 Seinast sýnaður: 26.04.05
Kr. 48.000,-



TOYOTA AVENSIS 2,0 TD SEDAN TERRA — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: TN 774 KM: 160.000
Árgangur: 16.08.00 Seinast sýnaður: 17.11.05
Viðmerkingar: Fjarstýrt sentrallás · Radio/CD · Elrútar framman
Útgjald kr. 40.460,- Kr. 115.000,-



TOYOTA STARLET 1,3 90-SERIA

Skrásetingarnr.: FM 481 KM: 67.000
Árgangur: 26.05.98
Kr. 58.000,-



TOYOTA RAV 4 2,0 D-4D 3 HURÐ 4x4 — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: VS 984 KM: 58.000
Árgangur: 24.04.02 Seinast sýnaður: 24.04.02
Viðmerkingar: Fjarstýrt sentrallás - Elrútar framman - Radio/CD
Útgjald kr. 51.400,- Kr. 205.000,-



FORD FOCUS 1,6 V/MVG — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: FN 646 KM: 47.000
Árgangur: 24.04.01 Seinast sýnaður: 01.06.05
Útgjald kr. 30.150,- Kr. 120.000,-



TOYOTA CARINA E 1,6 L/B

Skrásetingarnr.: KA 721 KM: 175.000
Árgangur: 01.01.93 Seinast sýnaður: 25.11.05
Kr. 35.000,-



SKODA FABIA COMBI 1,4 — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: SN 641 KM: 64.000
Árgangur: 26.06.02 Seinast sýnaður: 26.06.02
Útgjald kr. 24.650,- Kr. 98.000,-



TOYOTA AVENSIS 2,0 TD SOL — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: KP 422 KM: 203.000
Árgangur: 13.10.99 Seinast sýnaður: 26.07.05
Viðmerkingar: Fjarstýrt sentrallás · Radio/CD · Elrútar A+F
Kr. 95.000,-



CITROEN C3 1,4 DIESEL — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: JH 271 KM: 23.500
Árgangur: 22.12.03 Seinast sýnaður: 22.12.03
Viðmerkingar: Fjarstýrt sentrallás · Radio/CD · Elrútar framman o.a.
Útgjald kr. 33.150,- Kr. 132.000,-

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Bjarni Djurholm hevur biðið morgunbøn við Bush

**Bjarni Djurholm hevur á ferð í USA etið morgunmat og biðið morgunbøn saman við Bush, forseta. SvF setti spurnartekn við, um tað er rímiligt, at tað almenna rindar ferðina**

ALMENNIR PENGAR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

SvF setti í Degi og viku í kvøld spurnartekn við, um tað er rætt at tær almennu Føroyar gjalda fyri ferðina hjá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í vinnumálum, í USA, har hann í gjár m.a. át morgunmat og bað morgunbøn saman við George W. Bush forseta á National Prayer Breakfast, ið verður hildin fyrsta hósdag í februar á hvørjum ári.

Sambært sjónvarpinum skuldi vinnumálaráðharrin vera burturstaddur í 8 dagar, men av tí at ferðin er almenn, hevur Bjarni Djurholm ein fulltrúa frá Menningarstovuni við sær á ferðini, ið tó bert hevur verið saman við landsstýrismanninum í fýra tímar á túrinum.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, segði í innslagnum í Degi og viku, at enn er ov tíðliga at siga, um tað er rætt, at tað almenna rindar fyri ferðina, tí ferðaútreiðslur verða gjørdar upp, tá ferðin er liðug. Harafturat vísti hann til landsgrannskoðaran, ið skal kanna, um almennir pengar verða brúktir rætt.

Bjarni Djurholm fór avstað 30. januar og skuldi eftir ætlan koma aftur í dag.

# Flest arbeiðsvirkin í Føroyum í mun til fólkatalið

**Føroyingar eru sambært Hagstovuni arbeiðsvirknari enn nakað annað fólk í Evropa. Góð 90 prosent av íbúgvunum í Føroyum hava arbeiði**

HAGTØL
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Hagstovan gjørdi í november í fjør eina kanning av føroysku arbeiðsfjøldini

Kanningin varð gjørd sum telefonkanning, og Gallup Føroyar stóð fyri henni.

1.045 fólk vórðu spurd, hvussu teirra arbeiðsmarknaðarliga støða var frá 14. til 20. november 2005.

Hetta er tann fyrsta kanningin av sínum slagi í Føroyum, og hon er gjørd eftir altjóða ásetingum, so at úrslitini beinleiðis kunnu samanberast við samsvarandi tøl fyri onnur lond.

Higartil hava vit bert havt ógvuliga avmarkaða vitan um arbeiðsfjøldina í Føroyum.

Ósvaraðir spurningar, sum ofta eru frammi, eru til dømis:
Hvussu nógv eru virkin á arbeiðsmarknaðinum?
Hvussu nógv av teimum hava arbeiði í løtuni?
Hvussu býta tey seg eftir aldri, kyni og bústaði?

Hesum spurningum hevur ikki borið til at svarað, men Hagstovan sigur seg hinvegin hava góð hagtøl fyri talið á arbeiðsleysum.

Eftir altjóða áseting verður fólkið í arbeiðsførum aldri fyrst skift sundur í arbeiðsfjøld og vinnuliga óvirkin.

Arbeiðsfjøldin verður síðani skift sundur í arbeiðsvirkin og arbeiðsleys.

Hóast øll fyrivarni um óvissur, so vísa tølini frá Hagstovuni, at parturin av fólkinum, sum hevur arbeiði, er væl størri í Føroyum enn aðrastaðni. Av hinum londunum er tað bara Ísland, sum kemur upp um 80%. Eisni sýna hagtøl, at nærum líka nógv konufólk sum mannfólk hava arbeiði.

Kanningin vísti eisini, at arbeiðsloysið í Føroyum er sera lágt sum heild. Men eins og í hinum londunum, er arbeiðsloysið væl størri millum tey, sum eru yngri enn 25 ár. Í hesum aldursbólkinum er arbeiðsloysið í Føroyum hægri enn í Danmark, Írlandi og Niðurlondum.

# Trøllapætur og omman vitjaðu á flatlondum

**Í góðveðrinum leygardagin 4. februar vóru Trøllapætur og garvilla Trøllaomman í Danmark, har tey millum annað vitjaðu í Føroyahúsinum í Keypmannahavn**

VITJAN
*tíðindaskriv*

Tað hevur leingi verið ætlanin at vitja í Danmark, tí bæði donsk og føroysk børn spyrja javnan eftir trøllunum. Nú var so møguleiki hjá føroyingum uttanlands at uppliva fittasta trøllið í ríkinum og vælkendu Trøllaommuna. Omman og trøllið vístu øll síni trøllakynstur og harafturat hvat omman dugir innan rokktónleik.

Børn og vaksin vóru trøllabundin í 30 minuttir, og tað kann ikki sigast annað, enn at tiltakið eydnaðist sera væl. Tað var stúgvandi fult av fólki.

Men tá tiltakið var somikið stutt, vóru tað fleiri foreldur og børn, sum komu á gólvið mitt í tiltakinum. Og tey, sum komu ein hálvan tíma ov seint, fingu einki burturúr, so vónandi koma vældámdu høvuðspersónarnir skjótt aftur at vitja.

Á heimasíðuni hjá Føroyahúsinum verður upplýst, at tey bæði ætlaðu at heilsa upp á lítla prins Christian, men enn hava vit ikki frætt um tað eydnaðist.

Eftir at tey bæði høvdu verið á pallinum, var hovi at taka myndir av børnunum saman við føroysku trøllunum, og tað dámdu børnunum og sanniliga eisini foreldrunum væl.